Tórshavn, tann 21. november 2007
J.Nr.: 200700069
(at tilskila í svari)

Viðgjørt:

**Álit**
viðvíkjandi klagu um noktan av almennum innliti

Við teldubrævi, dagfest 23. aug. 2007, hevur A, tíðindamaður sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> ”Eg vil hervið kæra avgerðina hjá Tórshavnar Kommunu um at nokta at geva innlit í frágreiðingina hjá óheftum sýn- og metingarmanni í samband við bygging í … (Samanbygd hús á …) … Kommunan noktar at geva innlit í frágreiðingina smb. § 10, nr. 4, umframt § 12 í innlitslógini (sí niðanfyri). Eftir mínum tykki er talan um eina faktuella frágreiðing frá einum óheftum persóni, enntá útnevndur av Føroya Rætti. Eisini má málið metast at hava almennan áhuga, tá talan er um ikki færri enn 44 bústaðareindir, sum kommunan letur byggja. Tí meti eg meg hava rætt til innlit smb. § 11 og í øðrum lagi smb. § 4.
>
> Í hesum telduposti er eisini noktandi svarið frá Tórshavnar Kommunu og teirra grundgeving.”

**Málsgongd**

Í telefonsamrøðu 23. aug. 2007 hevur tíðindamaðurin biðið Tórshavnar kommunu um alment innlit í eina frágreiðing frá sýns- og metingarmanni. Tekniski stjórin hjá kommununi hevur gjørt soljóðandi notat frá samrøðuni:

> ”A frá … ringdi á fartelefonina hjá undirritaða uml. kl. 10:30 og bað um at fáa sýn- og metingarfrágreiðing, dagfest 31.07.07 útflýggjaða. Undirritaði avspákaði henda dagin, og var ávegis til …, tá eg varð uppringdur.
>
> Eg svaraði honum, at eg hevði biðið Løgdeildina hjá kommununi og advokatin hjá kommununi í hesum máli, B meta um, hvørt tað vóru løgfrøðiligar grundgevingar fyri ikki at útflýggja umbidna skjalið. A metti, at tað var ikki neyðugt, tí talan var um faktuellar upplýsingar, sum hann málbar seg. Eg greiddi honum frá, at sýnið- og metingin vóru ikki liðug, tí kommunan fór væntandi at seta fram ískoytisspurningar grundaðar á fyrstu útgávuna av hesi frágreiðing, og at eg fór ikki at takað støðu til útflýggjan av frágreiðingini, fyrrenn Løgdeildin hevði svarað aftur, og upplýsti honum, at eg dagin fyri hevði fingið at vita frá leiðaranum á Løgdeildini, at svarið kundi væntast dagin eftir. Eg bað A um at ringja aftur til mín kl. 13:00.
>
> Eg ringdi síðani til leiðaran á Løgdeildini at rykkja eftir svari. Hann greiddi frá, at áðrenn hann svaraði endaliga, ynskti hann at umrøða málið við eksterna advokat kommununar í hesum máli, men at hann hevði ikki fingið fatur á honum á fartelefonini hendan morgunin. Leiðarin á Løgdeildini metti tó fyribils, at skjali kom undir § 10, litra

4 í lógini um alment innlit, og sostatt ikki átti at útflýggjast. Undirritaði royndi so nakrar ferðir sjálvur at ringja til B, men tað eydnaðist ikki at fáa fatur á honum.

Kl. uml. 13:30 ringdi A aftur til mín. Eg boðaði honum frá, at fyribils niðurstøðan hjá Løgdeildini var ikki at ganga umbønini um alment innlit á møti, vísandi til § 10, litra 4. A svaraði við at vísa til § 11. Undirritaði svaraði tá, at eg fór ikki at gera meg klókari uppá løgfrøðisligar tulkingar enn Løgdeildin, men at hann var vælkomin at tosa við leiðaran á Løgdeildini, um hann vildi. Eg upplýsti honum eisini, at eg tók ongi onnur stig, fyrrenn eg hevði tosað við borgarstjóran, sum júst tá var ávegis úr ... til ...

Beinanvegin aftaná hesa samrøðu ringdi eg til B, adv., og fekk tá fatur á honum. Hann var púra samdur í niðurstøðuni hjá Løgdeildini, og vísti harumframt til § 12, av tí at hann metti, at talan var um trúnaðartilfar, sum viðførdi tagnarskyldu hjá kommununi.

Eg ringdi so uppaftur til leiðaran á Løgdeildini, sum tá var upptikin í telefonini. Hann ringdi so sjálvur upp til mín løtu seinni og upplýsti, at telefonin var upptikin, tí hann hevði tosað við A. Hann var annars eisini samdur við B um, at § 12 eisini var galdandi, og at hetta kom framum ásetingarnar í § 11.

Hann upplýsti at enda, at hann fór at svara A skrivliga við telduposti løtu seinni, og tað havi eg eftirfylgjandi staðfest, at hann hevur gjørt."

Við teldubrævi, dagfest 23. aug. 2007, hevur Tórshavnar kommuna svarað innlitsumbønini soleiðis:

"Sagt verður frá, at umbøn tygara um innlit í metingina frá Sýn- og metingarmanninum ikki verður gingin á møti.

Vit meta, at metingin er umfatað av § 10, nr. 4 í løgtingslóg um alment innlit í fyrisitingina (brævaskiftið við serkøn í einum møguligum rættarmáli). Vit vilja eisini nokta at útflýggja metingina samsvarandi § 12. Talan er um trúnaðartilfar, sum ikki er liðugt, og sum kann skaða umdømið hjá C. Støðan er tann, at býráðið ætlar at seta supplerandi spurningar fram, og kanska ætlar C eisini at gera tað sama. Tað verður sera trupult at viðgera málið víðari, um fyribils metingin verður útflýggja og soleiðis verður umrødd alment í fjølmiðlunum."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 28. aug. 2007, varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur.

Við teldubrævi, dagfest 25. sept. 2007, hevur Tórshavnar kommuna latið umboðsmanninum skjølini og hesar viðmerkingar:

"Víst verður til skriv tykkara, dagfest tann 28. august 2007, har biðið verður um frágreiðing í málinum, og øll skjøl verða send tykkum innan 4 vikur.

Vísandi til, at mál nr. ... er sera umfatandi av tí, at tað inniheldur øll skjøl, ið hava við byggingina av samanbygdu húsunum at gera, hava vit valt at senda tykkum skjalamappirnar 36 – 47 (harav skjalmappirnar 38, 40 og 41 eru feilskrásetingar og tí tómar), sum vit meta eru týdningarmiklar í hesum máli.

Vit hava tó viðheft skermprint við yvirliti yvir skjalamappu 22 til 59, so at Umboðsmaðurin kann meta, um hann ynskir fleiri skjøl.

Sum viðmerking til klaguna frá A vilja vit fyrst og fremst vísa til okkara svar við telduposti uppá umbønina um innlit, dagfesta 23. august 2007.
ÚF førdi fram, at talan var um faktiskar upplýsingar, sum Sýn- og metingarmaðurin var komin við í sínari meting, men tað var Kommunan ikki samd í. Sýn- og metingarmaðurin ger nakrar metingar, sum rætturin so brúkar at stuðla seg til, tá hann skal taka avgerð.

Tað skal eisini leggjast afturat, at tað hevur stóran týdning, hvussu tann einstaki spurningurin til Sýn- og metingarmannin er settur, og hvussu Sýn- og metingarmaðurin hevur skilt spurningin. Tí er vanligt, at báðir partar seta supplerandi spurningar fyri at fáa presicera ella rætta tað, sum Sýns- og metingarmaðurin hevur svarað.

At enda skal leggjast afturat, at samstundis sum arbeitt var við at seta supplerandi spurningar til sýn- og metingarmannin, vóru samráðingar millum partarnar um at loysa málið uttanum rættin. Tað var tí sera umráðandi fyri báðar partar, og ikki minst samráðingar "klimaði", at málið ikki bleiv blást upp í fjølmiðlunum við vanda fyri at partarnir fóru at samskifta umvegis hesar.
Hesar samráðingar komu á mál, og tann 27. august 2007 varð semja millum partarnar undirskrivað. Aftaná at semjan var undirskrivað, hevur A fingið fult innlit í málið – eisini metingina frá sýn- og metingarmanninum.

Um tit hava spurningar ella ynskja fleiri skjøl, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við undirritaða.

Um so skuldi verið, at Umboðsmaðurin ikki metir tað vera nøktandi at fáa svar og skjøl sent umvegis teldupost, væntar undirritaði at frætta."

Við skrivi, dagfest 28. sept. 2007, vórðu viðmerkingarnar frá kommununi sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tá umboðsmaðurin einki hevði hoyrt aftur frá klagaranum, var fráboðan, dagfest 17. okt. 2007, send pørtunum um, at málið varð tikið upp til endaliga viðgerð.

## Niðurstøða

Viðgerð mín av hesari klaguni snýr seg um, hvørt tað var rætt, tá Tórshavnar kommuna í fyrstu atløgu sýtti umbønini um innlit í umrøddu frágreiðingina frá sýn- og metingarmanninum.

Í svarinum, sum varð sent klagaranum sama dag, sum biðið varð um innlit, varð umbønin noktað vísandi til, at talan var um skjal, sum var fevnt av § 10, nr. 4. Sagt varð eisini, at kommunan vildi nokta innlit vísandi til § 12, tí talan var um innihald, sum kundi skaða felagið, ið var umrøtt í skjalinum.

§ 10, nr. 4 í innlitslógini eru soljóðandi:

"**§ 10.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um
...
4) Brævaskifti hjá einum myndugleika við serkøn til nýtslu í rættarmálum, ella tá støða skal takast til møguligt rættarmál.

Hendan regla er ætlað at verja samskiftið, sum tað almenna hevur við serkøn, tá eitt rættarmál koyrir ella verður fyrireikað. Oftast er talan um samskifti við egnan advokat, ella um frágreiðingar, sum myndugleikin biður serkøn, t.d. byggikøn fólk um. Endamálið er, at myndugleikin kann fyrireika eitt møguligt rættarmál best møguligt í friði og náðum, uttan at almenningurin ella mótparturin skulu fáa innlit í, hvørjar tankar myndugleikin og hansara ráðgevar hava gjørt sær um málið, og hvussu hetta skal førast.

Eg haldi ikki, at ein frágreiðing frá sýn- og metingarmanni, ið er settur av rættinum til at lýsa málið í sambandi við eitt rættarmál, er fevnt av § 10, nr. 4.

Hóast talan var um eina frágreiðing, sum er fevnd av § 10, nr. 4, átti kommunan at mett um, hvørt upplýsingar um fakta av týdningi fyri málið vóru at finna í frágreiðingini, og sum innlit tí átti at verið latið í sambært § 11.

Í svarinum til mín sigur kommunan, at talan var ikki um faktiskar upplýsingar, men heldur um metingar hjá metingarmanninum. Hesum sjónarmiði eri eg ikki heilt samd í. Frágreiðingin frá metingarmanninum um, hvat hesin hevur staðfest í sambandi við kanningar sínar, hvussu hann metir um gjørda arbeiðið á staðnum, og hvørjar ábøtur eru neyðugar, mugu sigast at vera faktuellar upplýsingar av týdningi fyri málið.

Kommunan vísir sum áður nevnt eisini til § 12 í innlitslógini. Sambært § 12, stk. 1, nr. 2 kann innlit noktast í tann mun, at veruligur vandi er fyri, at umrødda felagið kann vera fyri týðandi fíggjarligum tapi orsakað av, at innlit verður givið. Hendan reglan er grundað á kappingaratlit og er serliga ætlað at verja upplýsingar um rakstrar- og vinnuviðurskifti. Eg dugi ikki at síggja, at nøkur ítøkilig meting er gjørd um vandan fyri slíkum fíggjarligum tapi. Sambært § 12, stk. 2 skal innlit gevast í teir partarnar av skjalinum, har slíkur vandi ikki er til staðar.

Eftir at hava lisið umrøddu frágreiðingina dugi eg heldur ikki at síggja, at grundarlag var fyri at nokta innlit vísandi til § 12.

Vísandi til, at kommunan longu fýra dagar seinni, tá semja varð gjørd við umrødda felagið, hevur givið klagaranum fult innlit í frágreiðingina, haldi eg kortini ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hetta málið.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður